# 30 kappast um fyrsta plássið

**Nú er almannakunngjørt, at tað verða tilsamans 30 bólkar við í Prix Føroyum 2003. Fyrsta umfarið verður í Mentanarhúsinum í Fuglafirði um smáar tvær vikur**

TÓNLEIKUR
*Ingrid Bjarnastein*



*30 bólkar eru nú kunngjørdir til at luttaka í Prix Føroyum í ár. Fyrsta innleiðandi umfarið verður í Mentanarhúsinum í Fuglafirði tann 25. januar*

*Savnsmynd*

Tað vóru fleiri enn 30 bólkar, ið høvdu teknað seg til Prix Føroyar, nú tað tann 25. januar fer av bakkastokki. Freistin at tekna seg til prixið var tann 3. januar, og í seinasta lagi tann 6. januar skuldu bólkarnir hava sent fyrireikarunum eitt demoband. Um hetta ikki varð gjørt, vórðu bólkarnir ikki taldir við.

Nú kunngera fyrireikararnir, at tilsamans 30 bólkar hava lokið treytirnar fyri at vera við í kappingini.

Teir 30 bólkarnir, ið við vera, eru: Déjá vu, Blív, Bracket, Chain, Crashwave, Fluffy Toys, FLUX, GESTIR, Hansen, HATE-SPEECH, Headache Blues Treo, Holgar og Villmenn, Human Chaos, JAM, Krit Lawetz, Makrel, MARY´S BABY, masha, MC-Hár, Mind´s Eye, MMM, onkikanndiskuterast.alt kann, Páll Finnur Páll, S.C.A.T.G.O.H, Side Effect, Søren Søgaard, Speeker, Týr og Zink.

Øll innleiðandi umførini verða í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

Bólkarnir í fyrsta innleiðandi umfarinum verða: Headache Blues Treo, Human Chaos, Søren Søgaard, S.C.A.T.G.O.H, FLUX og MC-Hár.

Annað innleiðandi umfarið verður tann 1. februar.

# Onki ítøkiligt enn

**Politiið er framvegis ikki komið nakran veg í málinum um, at onkur hevur gjørt seg inn á eina 87 ára gamla konu. Arbeitt verður víðari við málinum**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*

Fyri stuttum skrivaðu vit um, at onkur hevði gjørt seg inn á eina 87 ára gamla konu. Politiið viðger málið sum eitt neyðtøkumál. Men politiið hevur enn ikki fingið nakað ítøkiligt, sum kann peika á, hvør gerningsmaðurin møguliga kann vera.

Arbeitt verður víðari við málinum, har persónar verða avhoyrdir og kanningar verða gjørdar. Tær læknaligu kanningarnar, ið gjørdar vóru, eru sendar til Danmarkar.

Ongin er beinleiðis undir illgruna, upplýsir politiið, men tað eru nakrir persónar, ið eru frammi. Men onki ítøkiligt er enn funnið, hvørki viðvíkjandi gerningsmanni ella læknakanningum.

# Tøkk

Tykkum, sum við blómum, gávum og uppringingum gleddu okkum á silvurbrúðleypsdegi okkara 29. desember 2002, takka vit hjartaliga.

**Ebba og Kaj Hovgaard**
**Fámjin**

# Vindurin tók streymin við

Í nógva vindinum, sum var mánakvøldið og týsnáttina, var eisini okkurt óhappið. Mánakvøldið tók vindurin tvær el-linjur á Argjavegnum niður. Hetta var um átta tíðina á kvøldi. Streymurin fór onkustaðni, men SEV fór á staðið og rættaði skaðan upp aftur.

Annars er ikki nógv hent, hvat stormi viðvíkur. Okkurt var fokið inn í ein parkeraðan bil í Eysturbýnum, og verður hetta fingið í rættlag aftur ígjøgnum tryggingina.



*Í nógva vindinum mánakvøldið fóru tvær el-linjur á Argjavegnum. Pelin vit er síggja er brotnaður*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Breyt armar og bein í Vágatunlinum

**Ein arbeiðsmaður hjá NCC kom illa til skaða tá hann mánakvøldið var til arbeiðis í tunlinum. Ein persónsbilur við nógvari ferð rendi á mannin. Førarin var ein ungur maður**

ÓHAPP
*Ingrid Bjarnastein*



*Mánakvøldið hendi eitt óhapp í Vágatunlinum. Ein arbeiðsmaður hjá NCC var árendur av einum bili, og breyt bæði armar og bein*

*Savnsmynd*

Um níggju tíðina mánakvøldið, meðan arbeiðsmenn frá NCC, vóru í holt við viðlíkahaldsarbeiði í Vágatunlinum, hendi eitt rættiliga álvarsamt óhapp. Ein arbeiðsmaður hjá NCC, sum var á veg út úr einum lastbili var árendur av einum persónsbili.

Politiið í Miðvági upplýsir, at talan var um ein ungan førara, sum var á veg norður eftir. Fimm fólk vóru í bilinum, og tey skuldu náa bátin úr Leirvík, og tí var ferðin ógvuliga høg.

Tveir lastbilar stóðu á hvørjari síðu í tunlinum, og av tí, at ungi maðurin ikki fær bremsað, ætlar hann at raka opið ímillum bilarnar. Tað hann ikki sær er, at ein maður er á veg úr einum av lastbilunum. Bilurin rakar tí mannin og maðurin liggur á bilinum einar 150 metrar áðrenn hann dettur av.

Upplýst verður, at maðurin kom illa til skaða. Bæði armar og bein vórðu brotin, og í skrivandi stund var maðurin undir skurði á Landssjúkrahúsinum. Politiið í Miðvági veit tí ikki enn, hvussu umfatandi skaðarnir vóru.

Fólkini, ið sótu í bilinum, fingu ongan skaða, tí tey sótu øll í trygdarbelti. Ungi førarin verður ákærdur fyri brot á ferðslulógina. Hvussu tann neyva ákæran kemur at ljóða verður upp til fútan at meta um.

Politiið sigur, at orsøkin til óhappið var tann nógva ferðin.

– Vanlig fólk við vanligari ferð høvdu sæð lastbilarnar, og at arbeitt varð í tunlinum, verður sagt.

Spurdir um teir møguliga fara at stongja tunnilin um náttina fyri at fáa frið at arbeiða, verður upplýst, at hetta neyvan kemur upp á tal. Fólk skulu bara koyra hóvliga.

# Frankenstein fer at ferðast

**Klaksvíkar Sjónleikarafelag fer nú at ferðast við væl umtókta skemtileikinum Frankenstein**

SJÓNLEIKUR
*Ingrid Bjarnastein*

Nú fáa onnur enn norðoyingar høvi at síggja skemtileikin, Frankenstein, sum Klaksvíkar Sjónleikarafelag hevur framført. Nú fer felagið nevniliga út at ferðast við leikinum, og fyrstu sýningarnar verða í Norðurlandahúsinum um vikuskiftið.

Sjónleikurin er bygdur á skaldsøguna, sum Mary Shelley skrivaði í 1818. Danin, Thomas Malling, hevur skrivað skaldsøguna um til skemtileik, og Andrias Justesen hevur týtt hann til føroyskt. Jákup Weyhe er leikstjóri.

Frankenstein er ein svørt komedia - ein farsa við einum álvarsamum innihaldi. 10 leikarar eru við - nakrir gamlir kenningar, men eisini nøkur nýggj talent.

Leikurin var framførdur 14 ferðir í Klaksvík, og nú er tíðin altso komin at fara útum landið við leikinum, og í hesum føri til Havnar.



*Klaksvíkar Sjónleikarafelag fer nú at ferðast við skemtileikinum Frankenstein*

*Mynd: Blitz Foto*



# Týr við í danskari kapping



*Týr ætlar at gera um seg í tónleikakappingum bæði heima og uttanlands í ár*

**Týr fer at verða við í bæði Prix Føroyum og stóru donsku tónleikakappingini Live Contest**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Týr verður ein av bólkunum, sum skal verða við í kappingini Live Contest. Hetta er sama kapping, sum fyri nøkrum árum síðani kallast DM i Rock. Kappingin hevur ligið í dvala, men nú kemur lív í hana aftur, og hon hevur fingið nýtt navn.

358 bólkar vildu sleppa við, men bert 83 pláss vóru. Týr var ein av bólkunum, sum varð valdur at sleppa við. 17 innleiðandi kappingar verða kring alt Danmark, og Týr skal spæla á Loppen í Keypmannahavn tann 6. mars.

Vinnarin av kappingini skal spæla tveir sangir inn hjá Neverland Rec., og P3 hjá Danmarks Radio hevur lovað, at hesir sangir verða spældir á rásini. Tað verður vanliga mett sum eitt stórt stig framá, um P3 tekur ein sang á sín playlista.

## Prix Føroyar gevur nógv

Týr verður eisini – kanska eitt sindur óvæntað – við í Prix Føroyum aftur í ár.

Flest allir bólkarnir, sum vóru sjónligir í Prix Føroyum í 2001, eru ikki við í kappingini ár. Tríggir teir fremstu bólkarnir í kappingini, Clickhaze, All That Rain og Tangz, eru ikki við í kappingini í ár. Men tað er hinvegin Týr, sum fekk rættiligt gjøgnumbrot í kappingini í seinast.

– Vit fingu ótrúliga nógv burtur úr Prix Føroyum seinast, hóast vit ikki vóru millum tríggjar teir fremstu bólkarnar. Vit sluppu á Jelling Festivalin, og vit fingu nógva umrøðu í fjølmiðlum heima og uttalands, siga teir í Týr.

– Nógvu umtaluna kunnu vit brúka til at marknaðarføra okkum í eitt nú Danmark. Okkara mál er at koma í finaluna, tí bara við at koma í finaluna er nógv vunnið.

Týr hevur, at umstøðurnar í Prix Føroyum eru so góðar, sum tónleikarar kunnu ynskja sær, og tað gevur hug at verða við aftur.

## Mangla sangara

Týr hevur framvegis ikki funnið nýggjan sangara, síðani Allan Streymoy fór úr bólkinum eftir stutt skifti sum sangari.

Á live-upptøkuni til Prix Føroyar kappingina er tað gittarspælarin Heri Joensen, sum syngur.

Tveir sangarar skulu royna síni evni saman við Týr í januar mánaði, men enn er óvist, hvør fer at syngja í bólkinum framyvir.


